

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 01 - 2013

# Danskt ja til urangrevstur í Grønlandi

Ein meiriluti í danska fólkatinginum er tilreiðar at loyva grevstri og útflutningi av urani í Grønlandi, um sjálvstýrið ynskir tað. Hetta verður ein søgulig broyting í donskum uttanríkispolitikki sigur serfrøðingur við Politiken. Ímóti kjarnorku í 25 ár Sambært blaðnum kann danska kongaríkið verða ávegis at vera ein av heimsins størstu útflytarum av uran, sum verður brúkt í risastóra kjarnorkuídnaðinum. Eftir at hava verið ímóti kjarnorku og urandálking í meira enn 25 ár er nú meiriluti í fólkatinginum fyri at seta úr gildi sonevndu nultoleransuna mótvegis uran. Um Grønland sum partur av Ríkisfelagsskapinum fer at koma við eini áheitan, er møguleiki nú fyri at setast kann á 5. størstu goymslurnar av uran í heiminum, Kvanefjeld, sum liggur í Suðurgrønlandi. Uran er hjáprodukt, tá tú ynskir at útvinna nøkur virðismikil og strategisk týdningarmikil metal til eitt nú fartelefonir. Uran verður bæði brúkt til kjarnorku og kjarnorkuvápn. Og orsakað av tí trygdarpolitiska týdninginum uran hevur skal Danmark spyrjast, áðrenn eitt forboð verður avtikið. Hvørki sosialdemokratarnir ella tey radikalu fara sambært Politiken at leggja seg í vegin fyri einum grønlendskum ynski, soleingi altjóða avtalur um eftirlit við uran verða hildnar. Kanna avleiðingar Grønlendski ráevnisstovnurin fer í vár at kunngera eina frágreiðing, sum skal gera greitt, hvørjar avleiðingar urangrevstur fer at hava á fólkaheilsuna og umhvørvið. Um avleiðingarnar ikki eru stórar, so skilst er ein meiriluti í grønlendska landstinginum fyri urangrevstri. Danska orkustýrið, sum ikki hevur gjørt sítt heimaarbeiði í sambandi við urangrevstur og ynskið hjá grønlendingum at kanna spurningar hesum viðvíkjandi, hevur nú lovað at seta ferð á hetta arbeiðið, soleiðis at ein møgulig uranvinna í Grønlandi ikki verður seinkað av orsøkum, sum liggja hjá almennum donskum stovnum.